

Her vóru kanningar gjørdar í 2012 av Chevron - millum Rosebank kelduna á bretskari síðu og Brugduna inni á føroyska landgrunninum. Nú vil enn ókent oljufelag longja linjuna frá Brugduni og inn móti landi.

# Kanna hvussu tjúkt basaltið er nærri Føroyum

Deil:

**Jan Müller**

01.08.2014 - 14:22

Oljan.fo

Nógvar kanningar eru gjøgnum árini gjørdar á føroyska landgrunninum fyri at fáa meira at vita um eitt nú tjúkdina á basaltinum. Men økið er sera stórt, og tí er framvegis nógv eftir at kanna, her ikki minst økini, sum liggja nærri landi.

Hetta ynskir eitt ella fleiri enn ókend feløg í oljuvinnuni nú at kanna nærri. Norska kanningarfelagið EMGS ASA, sum ger elektromagnetiskar kanningar nógva staðni í heiminum, hevur nú fingið eina ræettiliga stóra og spennandi uppgávu á føroyska landgrunninum, sum snýr seg um at fáa meira vitan um tjúkdina á basaltinum millum Brugduleiðina, har borað varð fyrr í ár og so land.

Talan er um eina verkætlan, ið fer at kosta 25 mill. kr. Avtalan snýr seg um sølu av verandi data frá eini kanning, sum varð gjørd í 2012 millum Rosebank kelduna bretsku megin markið og Brugduleitimiðið inni á føroyska landgrunninum, tann sonevnda “Brugdan-Rosebank linjan”.

Kanningarnar fara fram í september og fara at taka 10 dagar. Tað verður við kanningarskipinum BOA Thalassa.

Fyritøkan EMGS gongur oljufeløgum, sum vilja finna olju og gass í undirgrundini, til handa við serstøkum elektromagnetiskum kanningum.








